# Leggja størsta dentin á dygdarhandverk

*Á Berginum hava tey havt nógv at gera. Her eru teir í holt við eitt trol til Nesborg í Vági. Frá vinstru eru teir Hjørleif, sum er bilførari, Karl Johan, Øssur og Moodi*



**Á trolvirkinum Berginum í Hvalba, leggja tey størsta dentin á dygdarhandverk og tað syrgja garvaðir trolmenn fyri**

TROLVIRKI

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Er tað nakrastaðni í Føroyum, tey hava tradition fyri at arbeiða við troli, er tað í Hvalba.

Tað eru nú 20 ár síðani, at trolvirkið Bergið varð sett a stovn. Fyrst og fremst var tað ætlanin at levera reiðskap av allarbestu dygd til trolararnar i Hvalba.

Og á Trolvirkinum, Berginum, hava tey eitt loysunarorð og tað er: Dygdarhandverk!

- Vit levera bara fyrstafloks reiðskap av virkinum sigur Jógvan Thomsen á Berginum.

Trolararnir i Hvalba og í Suðuroy sum heild, hava alla tíðina verið trúgvir at keypa fra Berginum og hava verið eitt trygt grundarlag undir trolvirkinum.

Men skjótt fingu eisini aðrir útgerðarmenn eyguni upp fyri dygdarreiðsskapinum úr Hvalba og nú leverar Bergið trol, weirar og alla aðra útgerð um alt landið og eisini til skip uttanlands.

Men teir hava alla tíðina havt sum aðalmál at tað verður ikki slakað við kravinum um, at talan skal vera um dygdarhandverk.

## Garvaðir trolmenn

Á Berginum arbeiða einir fýrafimm mans og onkuntíð nakrir afturat, alt eftir, hvussu nógv er at gera.

Jógvan Thomsen sigur, at fleiri eru garvaðir trolmenn, sum hava verið í vinnuni í nógv ár. Ikki minst hava teir praktiskar royndir av skipsdekki, tí teir hava siglt við trolara.

- Sostatt mugu teir av sonnum kallast serfrøðingar á sínum øki, tí teir vita betri enn nakar annar, hvat krevst av reiðskapinum.

Samstundis eru bæði weirar og alt annað, teir brúka i framleiðsluni, bara tað allarbesta tilfari, og eru alt merki, sum hava staðið sína roynd.

- Vit hava eisini alla orsøkir til at vera sera væl nøgdir við úrslitið, tí afturmeldingarnar, vit faa aftur frá skipunum, eru, at teir eru sera vælnøgdir við trolini.

- Á Berginum hava vit lagt okkum eftir at gera botntrol og vit eru sálvandi sera fegnir um, at tey roynast væl.

Teir gera botntrol í ymsum støddum og sniðum, alt eftir, bátastøddini, hvar teir royna og hvat slag teir leggja seg eftir at fiska.

Trol broytast alla tíðina og á Berginum eru teir alla tíðina opnir fyri møguleikunum at gera tillagingar fyri at gera trolini so arbeiðslig og fiskulig, sum gjørligt.

Og í hesum sambandi leggja teir storan dent á at hava eitt tætt og gott samstarv við teir, sum manna skipini.

- Vit royna alla tíðina at fáa fiskimenn at siga okkum frá, halda teir at okkurt er, sum eigur at vera broytt við trolinum fyri at fáa tey arbeiðsligari og fiskiligari.

- Og tað gera fiskimenn eisini, tí tað er javnan, at vit fáa góð ráð frá fiskimonnum um, hvussu ábøtur og broytingar kunnu gerast, so tað er ein tilgongd, sum vit leypandi eru í.

Jógvan Thomsen sigur, at samstarvið við skipini er eitt, teir á Berginum virðismeta ógvuliga høgt.

Á Berginum hava tey havt nógv at gera í seinastuni og tað er mangan neyðugt at senda boð eftir fleiri fólkum.

- Og tað stendur ikki á. Tað eru altíð royndir trolmenn, sum eru heima av túri og teir eru altíð fúsir at rætta eina hjálpandi hond, so hóast vit hava brúk fyri eykamanning, eru tað oftast servandir trolmenn, sum traðka til.

- Hetta eru vit glaðir fyri, tí so fáa vit eisini hugsanir hja teimum sum eru við skipunum í dagliga.

## Byggja Bergið út

Bergið er eitt trolvirki í støðugari menning og nú er virkið við at veksa út úr húsinum á bryggjuni í Hvalba, har tey hava húsast øll hesi arini.

Sostatt eru ætlanir lagdar um at byggja virkið størri og í løtuni verður bíðað eftir byggitilboðum og tílíkum.

Tá ið tað er í lagi, er ætlanin at taka virkið niður og byggja nýtt rúmligari virki á sama staði.

Nýggi bygningurin er 600 fermetrar í tveimum hæddum og verður sostatt slakar 1200 fermetrar stórur og kemur sostatt nakað longur niðan enn virkið, sum nú er.

- Hetta gera vit fyri at gera tað arbeiðsligari á virkinum, so at vit samstundis eisini vera enn meiri

kappingarførir, enn vit eru, sigur Jógvan Thomsen.

Og hann sigur, at tað er alla tíðina neyðugt at vera á fremstu røð á øllum økjum, tí kappingin er hørð.

## Kappingaravlagandi

Men á trovirkinum hava teir eisini eitt hjartasuff.

- Hóast nógv virksemi er í Hvalba, mugu vit ásanna at samferðsluviðurskiftini til og úr bygdini eru als ikki nøktandi.

- Tunnilin er rætt og slætt ikki tíðarhóskandi, tí hon er ikki nóg rúmlig til at vanligir treylarar sleppa ígjøgnum hana.

Tað er eisini ein tvørleiki hjá Berginum, tí teir keypa inn í bingjum, fyri at fáa besta prisin, men tað má alt lastast um á Tvøroyri fyri at sleppa igjøgnum tunnilin.

- Tunnulin er ein fløskuhálsur fyri framleiðsluna hjá okkum, eins væl og hjá øllum øðrum vinnulivi í bygdini. Politikarar siga, at teirra fremsta uppgava er at skapa karmarnar, so at vinnan kann virka. - Men tað er kappingaravlagandi, tá ið viðurskiftini eru so ymisk runt um í landinum.

- Eftir okkara meting hevði tað verið náturligt at maskinurnar komu beinanvegin til Hvalbiar, tá ið Hovstunnilin er liðugur, soleiðis at Suðuroyggin kann gerast ein samferðslueind.

- Tað er neyðugt, at politikarar taka sær um reiggj og faa ein nýggjan tunnil, so at vinnan ikki missur kappingarførið, sigur Jógvan Thomsen.

